# Uttanlandssølur lætta um trýstið á fiskamarknaðinum í Føroyum

**– Prísurin á toski 1 og 2 hevur verið væl betri seinastu dagarnar, enn tá ið hann var lægstur herfyri. Men nú er aftur nógvur fiskur á føroyska marknaðinum, sigur Abraham Løkin á Fofish í Saltangará.**



*– Higartil hava sølurnar uttanlands verið rímiliga góðar, sigur Abraham Løkin*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað er so mangt, sum ávirkar fiskaprísin.

Abraham Løkin á sølufelagnum, Fofish í Saltangará, sigur, at prísurin á toski 1 og 2 hevur verið væl betur seinastu dagarnar, enn tá ið hann var lægstur herfyri.

Hann heldur, at sølurnar uttanlands í seinastuni hava havt sína ávirkan í so máta við tað, at tær hava lætt nakað um trýstið á marknaðinum her heima. Haraftrat kemur, at eingin línufiskur er landaður seinastu dagarnar, tí línuskipini, sum komu inn fyri páskir, bíðaðu nakrar dagar eftir betri streymi. Tey fóru útaftur tíðliga í síðstu viku og koma væntandi innaftur teir næstu dagarnar.

– Í morgun er aftur nógvur fiskur á marknaðinum í Føroyum, og um middagin fæst at vita, hvussu prísurin verður, sigur Abraham Løkin, sum væntar, at nógvi fiskurin fer at gera, at prísurin á toski lækkar nakað aftur.

### Sølur uttanlands

Síðan Fofish fór undir sítt søluvirksemi, hevur felagið selt fleiri lastir, bæði her heima og í Skotlandi. Skip hava siglt beinleiðis á útlendska marknaðin við fiskinum, og í øðrum førum er fiskurin landaður í Føroyum og sendur av landinum.

– Sølurnar uttanlands hava higartil verið rímiliga góðar. Tað hevur í øllum førum loyst seg at selt fiskin á útlendska marknaðinum.

Abraham Løkin sigur, at Fofish hyggur seg eisini um eftir prísunum í Íslandi og Danmark, men higartil er fiskurin, sum er farin av landinum, seldur í Skotlandi.

# Trolbátarnir hava rokfiskiskap

**Síðan tvær leiðir vórðu lætnar uppaftur vestanfyri og norðanfyri, 1. apríl, hevur onkur trolbátur fingið uppí eftir at hava roynt í eitt gott samdøgur**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Týskvøldið var trolbáturin, Búgvin av Toftum, á veg niður til Scrabster at selja. Skipið var fult undir lúkurnar av góðum toski. Hetta er aðru ferð í stutta tíð, at Búgvin fer til Skotlands við veiðini*

Teir umleið 20 trolbátarnir, sum hava minni enn 500 hk., hava havt sera góðan fiskiskap, síðan kassi I norður úr Mykinesi og sonevndi geirin norður úr Fugloynni vórðu lætnir uppaftur fyri trolveiði, 1. apríl. Hesi økir hava verið friðað í gýtingartíðini, og nú tey vórðu latin uppaftur, hava trolbátarnir havt rættiligan rokfiskiskap.

Theodor Poulsen, sum saman við øðrum eigur trolbátin, Búgvan, sigur, at teir, sum hava fingið mest, hava fingið uppí bátarnar eftir 4-5 hálum. Vanliga verður tógað einar 5 tímar, men seinastu dagarnar hava tógini verið stutt, einar 2-3 tímar.

– So, onkur bátur hevur fingið uppí eftir at hava roynt í stívliga eitt samdøgur, sigur hann.

Theodor er lítillátin og heldur fyri, at tað hevur gingið hampiligt hesar fyrstu dagarnar eftir, at gýtingarøkini eru latin uppaftur, men tað rætta at siga um gongdina hesar dagarnar er, at trolbátarnir hava havt rættiligan rokfiskiskap.

Sum skilst, er meginparturin av veiðini, sum trolbátarnir hava fingið, stórur og góður toskur.

### Á veg til Scrabster

Tá ið Sosialurin tosaði við Theodor týskvøldið, var Búgvin á veg niður til Scrabster at selja. Skipið var fult undir lúkurnar, eini 40.000 pund av toski.

Aðrir trolbátar hava eisini selt í Scrabster. Siglingin tekur einar 28-30 tímar hvønn vegin, og nettoprísurin hevur verið væl betur enn í Føroyum.

Búgvin seldi í Scrabster herfyri, og tá fingu teir ein nettoprís, sum lá um góðar 14 krónur í miðal fyri kilo.

– Seldu vit lastina í Føroyum, fingu vit einar 11 krónur í miðal fyri kilo, sum prísurin var tá. So, hendan sølan loysti seg, sigur Theodor.

Tað eru tó ikki allir trolbátarnir, sum hava selt veiðina í Skotlandi. Sum skilst, hava teir flestu selt á marknaðinum í Føroyum.

### Landa bæði dag og nátt

Onkur hevur fýlst á, at Fiskamarknaður Føroya ikki landar skip og bátar allar dagar í vikuni og allar tíðir á døgninum, tí tað hevði passað betur hjá teimum, sum koma inn í vikuskiftinum og ætla sær útaftur sum skjótast.

– Í Skotlandi er líkamikið, hvør dagurin er, og tað er eisini líka mikið, um tað er dagur ella nátt. Teir standa klárir, tá ið skipini koma.

Theodor vísir á, at skotar gera alt fyri at fáa hendur á fiskinum.

– Men líkt er ikki til, at hetta er neyðugt í Føroyum, tí her er so nógvur fiskur á marknaðinum kortini. Virkini fáa tann fisk, tey vilja hava. Teimum nýtist ikki at gera nakran serligan innsats í so máta. Í vár er tað enntá hent, at virkir hava sagt fisk frá sær, sigur Theodor Poulsen at enda.

# Teir friða á einum skriviborði

**– Eingin toskur gýtir á 200 favnum. Kortini verður norðasti parturin av holinum, sum er millum Skeivabanka og Mykinestunguna friðaður sum gýtingarøki hjá toski, sigur Theodor Poulsen**



*– Tað er ikki skilagott bara at sita á eini skrivstovu og seta nakrar tilvildarligar strikur »her frá og har til« uttan at vita, hvat tað er, tú gert, sigur Theodor Poulsen*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað er ikki altíð so lætt at skilja politiska viljan og politisku avgerðirnar.

Theodor Poulsen, sum saman við øðrum eigur trolbátin, Búgvan, skilir ikki, hví landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, friðaði norðasta partin av sonevnda holinum millum Skeivabanka og Mykinestunguna í gýtingartíðini

– Hetta er eitt øki, sum í støðum er heilar 200 favnar djúpt og er avgjørt ikki gýtingarleið hjá toski. Gýtingarfiskur fer nevniliga uppá grunt vatn at gýta og ikki niður á 200 favna dýpi.

Theodor vísir á, at holið er góð havtaskuleið hjá trolbátunum, men við tað, at norðasti parturin av økinum hevur verið friðaður, hava bátarnir mist tað mesta av einum triðingi av hesi havtaskuleiðini, og tað hevur órógvað fiskiskapin eftir havtasku í gýtingartíðini.

Hetta økið, sum hevur verið friðað í gýtingartíðini í nøkur ár, er latið uppaftur, 1. apríl.

### Á skriviborðinum

– Tað er ikki skilagott bara at sita á eini skrivstovu og seta nakrar tilvildarligar strikur »her frá og har til« uttan at vita, hvat tað er, tú gert.

Theodor sigur, at norðasti partur av holinum er tikin við uppí friðingina í nøkur ár og teir, sum eiga trolbátarnar, hava fleiri ferðir roynt at fáa landsstýrismannin at skilja, at einki endamál er við at friða hendan partin.

– Men tað vísir seg at gera tað sama, hvør situr í Tinganesi, tí teir lurta ikki eftir okkum kortini. Hinvegin eydnaðist útróðrarmonnum at fáa Jørgen Niclasen at økja um friðingarnar vestanfyri, soleiðis at línubátarnir vórðu nógv skerdir. Men landsstýrismaðurin hevur ongar sømdir veitt okkum, hóast vit hava vent okkum til hansara í samband við umrødda part av holinum millum Skeivabanka og Mykinestunguna, sigur Theodor Poulsen.



# Avlurting avgerandi

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*



*Savnsmynd*

Mikumorgunin var ein 30 ára gamal dani í Føroya Rætti, ákærdur fyri brot á revsilógina viðvíkjandi rúsevnum. Maðurin, sum hevur bústað í Keypmannahavn, hevur sitið avbyrgdur í varðhaldinum síðan 16. januar, tá hann varð tikin í danska høvuðsstaðnum.

Ákærin hevði fýra punkt í ákæruritinum, og tey snúðu seg øll um at selja rúsevni og skipa fyri rúsevnasmugling.

Hann er ákærdur fyri at hava staðið fyri smugling av tilsamans 50 grammum av kokaini til Føroyar, har hann hevði eina úrtøku á 12.500 krónur. Eisini er hann ákærdur fyri at hava staðið fyri smugling av einum kilo av hassji til Føroyar á vári ella sumri í 2001, tá hann hevði eina úrtøku á 10.000 krónur.

Harumframt er hann ákærdur fyri at hava selt og keypt kokain og hassj í Keypmannahavn.

Ákærin kravdi, at rættarfundurin fer fram fyri afturlatnum hurðum, tí kanningararbeiðið í øðrum máli ikki er liðugt enn. Hesum tók dómarin undir við. Hann vísti á, at í Danmark hava fjølmiðlar rætt at kæra eina slíka avgerð um afturlating av hurðum, men so er ikki í Føroyum.

Ein partur av prófførsluni hjá ákæruvaldinum var avlurting av telefonsamrøðum, tí í rættinum var útgerð at lurta eftir bandaðum samrøðum. Dómur fellur skjótt í málinum, og hann hava vit vónandi við í blaðnum í morgin.

# Felags valfundir

**Tíðindaskriv**

Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin í Suðurstreymi skipa í felag fyri trimum almennum valfundum í sambandi við komandi løgtingsval. Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin eru eisini boðnir við til fundirnar.

Fundirnir verða skipaðir við trimum umførum. Í hvørjum umfari hava valevni hjá øllum flokkunum fyrst eina stutta framløgu, síðan verður høvið hjá áhoyrarunum at seta teimum spurningar áðrenn fari verður til næsta umfar. At enda fáa flokkarnir helt stutt møguleika at draga saman um.

Fundirnir verða á Argjum, í Hoyvík og í Havn hesar dagar:

Hósdagin 11. apríl, kl. 20.00 í skúlanum á Argjum, Týsdagin 16. apríl, kl. 20.00 í skúlanum í Hoyvík og Flagdagin, 25. apríl, kl. 20.30 á Læraraskúlanum í Havn.

Harumframt er ætlanin at hava ein valfund í Nólsoy, nærri verður at frætta um hendan fundin seinri.

# Barsskor fer aftur at sigla nú



**Klaksvík:** Strandfaraskipið Barsskor fer nú aftur at sigla eftir at hava verið á beding í tríggjar vikur. Barsskor hevur fingið nýggjan motor.

Súni Andreassen frá Teknisku Deild á Strandferðsluni, sigur, at hann vónar, at Barsskor fer aftur at sigla í kvøld.

Hesa tíðina Barsskor hevur ligið á beding, hevur Súlan røkt siglingina um Kalsoyarfjørð.

**-sae-**

# Hesi skulu avloysa Helenu

VAL
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Striltið hevur gingið hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreym at gera uppstillingina lidna til komandi løgtingsval, nú flokkurin hevur verið so skerdur, tí atkvøðuslúkurin Helena Dam á Neystabø hevur tikið seg úr flokkinum.

Í seinastu løtu eydnaðist tað at seta ein lista saman og her eru so tey, sum skulu lyfta arvin eftir Helenu.

Eilif Brimheim, kavari Tjarnardeild 19 FO- 100 Tórshavn

John Eysturoy, skrivstovumaður Mýrisnípuvegur 26 FO- 100 Tórshavn

Hans J. Hermansen, koyrilærari Tórsbyrgi 16 FO- 100 Tórshavn

Noomi Sigmundsdóttir Júliusson, handilskvinna Dalagøta 22 FO- 100 Tórshavn

Ása Olsen, fakfelagsleiðari Berjabrekka 193 FO- 100 Tórshavn

Roar Heini Olsen, góðskuleiðari Skúlagøta 5 FO- 100 Tórshavn

Ronald Poulsen, byggifrøðingur Turiðargøta 27 FO- 100 Tórshavn

Johan M. Stenberg, lærari Viðargøta 12 FO- 160 Argir

Thordur Thorsteinsson, sølumaður Sverrisgøta 19 FO- 100 Tórshavn.


GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1997, 151.000 km.
94.000

**Nissan Primera 1,6 LX**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1995, 126.000 km.
69.000

**Nissan Primera 2,0**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1991, 121.000 km.
47.000

**Nissan King Cab 4x4 Diesel**
gráur, 2 hurðar,
árg. 1996.
78.000

**Peugeot 306 Diesel Aircon**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1999, 47.000 km.
125.000

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
67.000

**Opel Astra 1,6 Club Wagon**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1995, 110.000 km.
55.000

**Opel Astra 1,7Dtl**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 108.000 km.
99.000

**Opel Astra 1,8 Club Wagon**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1995, 104.000 km.
70.000

**Opel Astra 1,6 Club**
grønur, 4 hurðar,
árg. 2000.
119.000

**Opel Astra 1,6**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1999, 52.000 km.
119.000

**Opel Astra 1,7d Wagon**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 142.000 km.
55.000

**Opel Astra 1,6 Club Wagon**
brúnur, 5 hurðar,
árg. 1997, 40.000 km.
85.000

**Opel Vectra 2,0 Sport**
Svartur, 4 hurðar,
árg. 1999, 39.000 km.
157.000

**Opel Vectra 2,0 Di**
beige, 4 hurðar,
árg. 1997, 80.000 km.
117.000

**Ford Fiesta**
bláur, 5 hurðar,
130.000 km.
22.000

**Mazda 323 1,5**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1998, 66.000 km.
95.000

**Mazda 323 F 1,6i GLX**
vínreyður, 5 hurðar,
árg. 1996, 116.000 km.
77.000

**Seat Cordoba Vario 1,4**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1999, 25.000 km.
89.000

**Toyota Starlet**
bláur, 3 hurðar,
árg. 1997, 60.000 km.
65.000

Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin